## Broyta fosturtøkulóg

Í Spania ætlar stjórnin at broyta fosturtøkulógina, soleiðis at kvinnur frá 16 árum og uppeftir skulu hava rætt til fosturtøku. Tann galdandi lógin, sum er frá 1985, loyvir bara fosturtøku, um kvinnan er vorðin við barn undir neyðtøku, um talan er um misfostur, ella um kvinnan av heilsuávum kann koma í lívsvanda av at ganga við barninum. Nú ætlar stjórnin at broyta lógina, so kvinnur frá 16 ára aldri kunnu fáa fosturtøku, tá fostrið er yngri enn 14 vikur. Er vandi fyri lívinum hjá kvinnuni, kann hon fáa fostrið tikið, til tað er 22 vikur gamalt. Katólska kirkjan er harðliga ímóti uppskotinum.



## Fangar til Írlands

Tveir menn, sum hava sitið í fangaleguni í Guantanamo, eru sendir til Írlands, og ein triði er sendur til Jemen, haðani hann er ættaður. Sambært amerikanska løgmálaráðnum eru tað tveir usbekar, sum eru sendir til Írlands. Samstundis hava amerikanararnir gjørt avtalu við tað lítla oyggjalandið Palau, sum hevur játtað at taka ímóti 12 kinesiskum muslimum úr Guantanamo. Løgmálaráðið í Washington sigiur, at nú eru 223 fangar eftir í Guantanamo-leguni. Nakrir teirra verða sendir til onnur lond, og nakrir koma fyri hernaðardómstólar í USA, sigur løgmálaráðið.

# Rannvá takkar skúlanum við listaverki

**Sum tøkk fyri árini, hon gekk á studentaskúlanum í Hoydølunum, hevur listakvinnan Rannvá Kunoy latið skúlanum stórfingið listaverk**

LISTAGÁVA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*- Eg eri vísur í, at steinprentrøðin Frontal er eitt listarverk av tí slagnum, sum ongantíð tømist fyri týdningar, segði Mikkjal Helmsdal, rektari á Føroya Studentaskúla, tá hann avdúkaði listaverkið fríggjadagin*

Ein sera fegin rektari á Føroya Studentaskúla avdúkaði fríggjadagin eitt listaverk, ið ein av fyrrverandi næmingunum hevur latið skúlanum. Næmingurin er ongin minni enn listakvinnan Rannvá Kunoy og verkið er ein sermerkt litprentsrøð við heitinum »Frontal«. Røðin er sett saman av fimm myndum, sum nú prýða ein langan vegg á miðhæddini á skúlanum saman við snøggari navnaplátu.

### Ikki í iva

Tað var á sumri í 2008 at Rannvá Kunoy setti seg í samband við Mikkjal Helmsdal, rektara á Føroya Studentaskúla, og spurdi, um skúlin var áhugaður í at taka ímóti einum verki, ið hon var í ferð við at gera á grafiska verkstaðnum, sum tá lá við Listasavn Føroya í Gundadali, greiddi rektarin frá í røðu í sambandi við avdúkinguna.

Nakrar vikur seinni, tá verkið var liðugt, bjóðaði Rannvá Mikkjali Helmsdal oman í grafiska verkstaðin at hyggja at verkinum, tí hon vildi fegin, at hann sá tað, áðrenn skúlin tók ímóti gávuni.

- Fyri at tryggja mær dygga fakliga uppbakking bað eg myndlistalærara okkara Kinnu Poulsen koma við. Og vit vóru ikki í iva um, at hetta var ein gáva av eini slíkari listarligari dygd, at skúlin átti at taka ímóti henni. Eisini sjálvt um verkið kravdi so mikið veggjapláss, at vit ikki beinanvegin vistu, hvar á skúlanum vit skuldu finna pláss fyri myndunum, segði Mikkjan Helmsdal.

Nógvir ymiskir veggir hava verið umhugsaðir, men at enda mátti so stóra uppslagstalvan á miðhæddini víkja fyra listini.

### Ríkandi gáva

Hóast tað er ein klisjé, at góð list ríkar gerandisdagin, er tað ikki tess minni ein sannleiki, at góð og hugvekjandi listarverk gera eitt rúm hugaligari og heimligari at vera og trívast í, staðfesti rektarin. Serliga tá talan er um listarverk, sum lyfta seg langt upp um tað bráðvakra og dekorativa, og sum dag um dag og ár um ár bjóða tær av at síggja nýggjar síður og nýggj brigdi av sær sjálvum.

- Tað er tað, sum eg fái burtur úr góðari list í mínum nærumhvørvi og tað er tað, ið eg vænti, at vit starvsfólk og næmingar fara at fáa burtur úr hesum verkinum. Tí eg eri vísur í, at steinprentrøðin Frontal er eitt listarverk av tí slagnum, sum ongantíð tømist fyri týdningar og brigdi, hvussu so leingi ella ofta tú hyggur at tí og fordjúpar teg í tí, segði Mikkjal Helmsdal.

Hann legði afturat, at Rannvá grundgav gávu sína við, at hon fegin vildi geva nakað av tí aftur, ið hon føldi, at skúlin hevði givið henni tey trý árini, ið hon gekk á skúlanum frá 1991-1994.

- Skúlans vegna vil eg takka Rannvá Kunoy hjartaliga fyri hesa sera generøsu og stórfingnu gávuna, segði Mikkjal Helmsdal, sum við hesum orðum avdúkaði steinprentsrøðina Frontal.




*Ein snøgg pláta á vegginum minnir um gávuna, sum listakvinnan Rannvá Kunoy hevur latið Studentaskúlanum í Hoydølum sum tøkk fyri árini, hon gekk har*

# »Glansbílætasamlararnir« út á norskum

Í dag kemur skaldsøgan »Glansbílætasamlararnir« hjá Jóanes Nielsen út á norskun. Hetta er fjórðu ferð føroyski rithøvundurin verður týddur til norskt.

Í Noregi er Jóanes Nielsen longu kendur sum lyrikari við eitt nú yrkingasøvnunum »Pentur«, »Brúgvar av svongum orðum« og «Tey eru, sum taka mánalýsi í álvara». Tað er Lars Moa, sum stendur fyri týðingunum, og tað er eisini hann, ið nú hevur týtt »Glansbílætasamlararnir«, sum á norskun hevur fingið heitið »Glansbildesamlarane«.

Í Danmark vakti »Glansbílætasamlararnir» ans, tá hon kom út á donskum í fjør, og fekk bókin stak góð ummæli í fleiri donskum bløðum.

Norska týðingin kemur út á Heinesen forlag.




*Fyri fjórðu ferð er ein bók hjá Jóanes Nielsen nú týdd til norskt*